gult cyan magenta svart



ÍF–Fleyr 2–3 25-20, 25-22, 20-25, 23-25, 13-15

# Fleyr vi› í toppinum



Hóast tær ikki eru á sama stø›i sum fyri fáum árum sí›ani, so røkist kanska fyri, at Fleyr kvinnurnar aftur sleppa at kenna smakkin av hei›ursmerkjum

**Fleyr er nú um at lyfta seg upp móti toppinum, har tær aloftast hava veri › vanar at vera, tó at avrikini seinastu árini als ikki hava bent á nakra veruliga oddastø›u**

FLOGBÓLTUR
*Meistaradeild kvinnur*

ÍF og Fleyr spældu ein sera spennandi dyst á Kambsdali sunnudagin. Hetta eru tvey av li›unum, sum dystast um 3. plássi› í deildini. Men vi› sigrinum hevur Fleyr framvegis samband vi› toppin, og tveir teir næstu dystirnir hjá Fleyr eru ímóti Mjølni og Drátti í Gundadalshøllini.

Í hesum dystinum var javnt mestsum alla tí›ina. ÍF kom tó betur frá byrjan í tveimum teimum fyrstu settunum, men Fleyr kom fyri seg og vann lei›sluna inn aftur. Hjá ÍF var Helen á Lakjuni serliga sjónsk. Hon spælir á mi›juni, og hev›i hon nógv skjót álop, sum Fleyr ikki megna›i at ste›ga. Álopsspæli› hjá ÍF var ikki so nógv burtursæ› frá Helen. Roynt var› vi› lobbum, og annars vi› gó›um verjuspæli, og ta› eydna›ist væl.

Hjá Fleyr hevur gingi› sera væl seinastu dystirnar, og skilligt var, at li›i› vildi vinna. Leikararnir kempa›u fyri hvønn bólt, og teir trupulleikar, sum vóru fyrst í kappingarárinum, eru nú burtur.

## ÍF væl frá byrjan

ÍF setti seg á dystin beinanveg. Í fyrsta settinum vóru kvinnurnar úr Fuglafir›i væl frammanfyri alt setti›. Sama gongdin var í ø›rum setti, men nú var Fleyr á veg inn í dystin. Blokkurin var um at fáa taki› á Helen, og álopsspæli› hjá Fleyr kom í sving.

Tí var ta› als ikki løgi›, at Fleyr í 3. setti tók seg frá ÍF. Í hesum settinum sást, at dysturin var um at venda. Fleyr hev›i gó›a spæli› frammi, og ÍF gjørdi nógv mistøk. Móttøkurnar vóru ikki nóg gó›ar, og álopsspæli› ikki nóg avgjørt.

## Spenningurin í topp

ÍF kom skjótt aftur á beina kós, og í 4. setti sá alt út til at skula eydnast. ÍF ni›urspældi Fleyr og eftir stuttari løtu var stø›an 11-2 til ÍF. Hetta var gongdin langt út í setti›, men so koppa›i alt. Fleyr bardi seg inn aftur í dystin, og ÍF fall í fátt. Tær blaka›u lei›sluna fyri bor›, og Fleyr kom upp á stø›una 23-23. Tvær gó›ar servur løgdu grundarlagi› undir, at Fleyr tók 4. setti›, og nú kundi alt henda.

5. setti› byrja›i væl hjá Fleyr, og tá i› li›ini skiftu sí›u, var stø›an 8-3. Men ÍF gavst ikki so, og rættiligur spenningur kom nú í. Stø›an var 13-13, og nú ráddi um ikki at gera mistøk. Fleyr átti servuna. Hon eydna›ist væl, og Fleyr vann seg fram til dystarbólt. Servan hesafer› eydna›ist betur enn tann fyrra. Bólturin fór langt aftur á vøllin. ÍF-kvinnurnar hildu bóltin vera úti, og lótu hann tí fara, men dómarin dømdi bóltin at vera inni, og sostatt vann Fleyr dystin.

Kvinnurnar í ÍF vóru sum vera man ógvuliga skuffa›ar eftir dystin. Tær tóku ikki møguleikan tá i› hann var har, og tí mistu tær alt. Fleyr str‡kur avsta›, og kunnu í teimum næstu dystunum rættiliga gera seg galdandi.

ÍF–Fleyr 1–3 (20–25, 16–25, 26–24, 25–20)

# Tummas Óli Mortensen blokka›i jugoslavan í gólvi ›

**Klæmint Isaksen, Fleyr**

– Vit brúktu somu uppskrift, sum tá vit leiktu ímóti Fram, og harumframt hava vit fingi› størri ró og breidd á li›i› nú. Í verjupartinum brúktu vit Jan Hentze sum libero, og kom hann inn fyri Andrass Jógvansson og Janus úr Dímum. Hetta gjørdi t.d., at Andrass og Janus bert skuldi hugsa um álopspartin, og tí komu teir sera væl frá. Og at hava ein hevara sum Tummas Óla at taka til, er frálíkt.

**Fleyr lumpa›i føroyska flogbóltsheimin, tá teir um vikuskifti› vunnu á ÍF, og meistaradeildin tykist nú opnari, enn hon nakran tí› hevur veri ›**

FLOGBÓLTUR MENN

ÍF hevur higartil haft eitt gott kappingarár og vann millum anna› 3-0 á Fleyr í fyrsta dystinum í Havn, so ta› vóru fá sum rokna›u vi›, at Fleyr fór at gera um seg á Kambsdali. Men eftir dystartølunum higartil, skal ein onganti› undirmeta havnarli›i›.

Fyri fáum vikum sí›ani tóku teir øll á bóli vi› at vinna á Fram, og hetta vi›førdi, at Fram tapti tríggjar dystir á ra›, so spennandi ver›ur at síggja um ÍF fær somu lagnu.

## Klæmint gó›ar servur

Fleyr kom best frá byrjan í dystinum og vann bæ›i tey fyrstu settini ávikavist 25-20 og heili 25-16, og var hetta millum anna› vi› stórum servutr‡sti frá Klæminti Isaksen, Fleyr, men Fleyr vísti í hesum settinum eisini, at li›i› gott kann leika gó›an flogbólt.

Eisini høvdu Fleyr leikararnir lagt seg eftir at leika nógv mi›juálop, solei›is at Steinar Eiriksson og Janus úr Dímun høvdu gó›ar dagar.

Hjá ÍF gekst minni gott, og serliga vóru ta› Boban og Bartal Eliassen, sum ikki fingu smash síni at koyra líka væl, sum t.d. tá teir leiktu ímóti Fram fyri tveimum vikum sí›ani. Nógv av smashunum enda›u uttanfyri, og hetta skyldast kanska eisini at samanspæli› millum teir og hevaran Bjarna Joensen, ikki virka›i eins væl og ímóti Fram.

## ÍF vi› aftur

Men ÍF kom væl vi› aftur í tri›ja setti. Betur gekst í verjupartinum, og ein kendi ÍF li›i› aftur, vi› sínum gó›a verjuleiki, har eitt av serey›kennunum er, at ta› er næstan ómøguligt at sláa bóltin í gólvi›. Men eisini hetta setti› mundi ÍF mist á gólvi›, tí hóast ÍF hev›i ført meginpartin av settinum, so megna›i Fleyr at koma upp á 24-24, tá so Steinar Eirkikstoft kikasa›i eina servu í undirkantin á netinum, og sostatt kom ÍF á odda 25-24 og vann eisini næsta bóltin og harvi› setti› 26-24.

## Tummas Óli vendi øllum

Fuglfir›ingarnir fingu nú bló› upp á tonna og herja›u á aftur í 4. setti, har teir sleptu í tri›ja. Teir komu á odda heili 16-8, og var hetta serliga eftir gó›ar servur frá millum anna› Kenneth Neshamar, sum serva›i frá 5 upp á 11 og frá Boban, sum serva›i frá 11 upp á 16.

Men vi› stø›una 14-8 til ÍF skifti Fleyr hevara, solei›is at Jákup Villiam Sivertsen, - sum higartil hev›i leikt sera væl — fór út, og veteranurin Tummas Óli Mortensen kom inn at heva. Og hetta var gulleggi› í dystinum. Vi› sínum drúgvu royndum eydna›ist ta› Tummas Óla at venda dystinum, solei›is at Fleyr vann setti› 25-20, harav ta› til seinast eydna›ist honum í einum einmansblokki at stø›ga jugoslavanum Boban í seinasta bóltinum, solei›is at ta› enn einfer› kundi prógvast, at Fleyr ikki skal avskrivast í dystinum um hei›ursmerkini.

Fleyr skal komandi vikuskifti leika ímóti Mjølni í Havn, so spennandi ver›ur at síggja, um havnarli›i› enn einafer› tekur øll á bóli.



SÍ-Fram 0-3 (21-25, 14-25, 24-26

# Fram aftur á sigurskós

**Eftir at havt laka úrtøku seinastu dystirnar, fekk Fram endiliga glið á aftur, tá teir um vikuskiftið hittur botnliðið úr Sørvági**

FLOGBÓLTUR
*Meistaradeild menn*

Seinastu vikurnar hava verið vánaligar hjá Fram. Liðið fekk sera góða byrjan á kappingarárið, men so steðgaði alt upp. Tríggir ósigrar á rað, so tí var dysturin í Sørvági leygardagin ógvuliga týdningarmikil. Tað var hann eisini hjá SÍ, tí enn er einki stig komið á kontoina. Talan var sostatt um tvey lið í kreppu.

Hesi liðini hittust fyrr í kappingarárinum í Havn. Tá vann Fram lættliga, men SÍ hevur staðið seg væl á heimavølli, tó einki stig er vunnið enn. Hesin dysturin var tí opin.

## Broytt lið

Romica Pascu, sum venur Fram, hevði sett seg sjálvan uttanfyri til henda dystin. Tí fekk Bogi Andreasen møguleikan at vísa, hvør dugur er í. Bogi spældi kantsmashari, og hann kom væl frá uppgávuni.

Í fyrsta settinum gekk rættiliga javnt á, men Fram tóktist tó at hava takið á SÍ. Hjá SÍ vóru gomlu kenningarnir, Sune Hansen og Anfinn Joensen á liðnum, og teir eru altíð drúgvir. Anfinn hevur ikki spælt so nógv í ár, men evnini at blokka hevur hann ikki gloymt. Hann vann nógvar blokkar í dystinum, og Sune tók sær av álopunum. SÍ ger tíverri ov nógvar villur, og tað kostar.

2. sett var skjótt avgreitt. Fram streyk avstað við góðum spæli, og nú sá út til, at dysturin var liðugur. Seinast í settinum gjørdi Fram nakrar broytingar, og liðið var broytt nakað, tá ið 3. sett byrjaði.

Ungi Høgni Viderøe var komin inn fyri Boga Andreasen. Hann slapp peint í eldin, tí allr servurnar frá SÍ endaðu hjá honum. Hetta settið gjørdist ógvuliga javnt allan vegin og ongantíð var munurin stórur. Fram gjørdi aftur nakrar broytingar á liðnum, og m.a. kom Bogi inn aftur at spæla. Tað hevði so mikið av ávirkan á gongdina, at Fram endaði omaná.

Hjá SÍ var hetta enn ein taptur dystur. Úrslitið gjørdist 3-0 til Fram, sum nú aftur er í oddastríðnum. Við manningini SÍ hevði henda dystin, verður spennandi at síggja, hvat kann henda í seinnu hálvu. Onkur sigur man fara at enda í Sørvági.

*Spurningurin tykist nú vera, um Fram við sigrinum hevur megnað at vent skeivu gongdini, sum liðið hevur havt seinastu dystirnar*

Ókeypis at stovna

Royn allar møguleikarnar!

- Boðtóni
- Parkering
- Trípartasamrøða
- "Trýst 5"
- Veking
- Víðaristilling
- Vís nummar
- Fastur móttakari
- Stutt nummarval
- Sperr við loynitali
- Órógva ikki

Til 1. mars 2001 eru tænasturnar til fastnetið ókeypis at stovna, og mánaðargjaldið er kr. 15,- fyri hvørja tænastu. Les meira í faldaranum, ið verður borin í hvørt hús...

FØROYATELE

petur & petur • 320870